# Føroyingur læt lív í flogvanlukku



*Eiler Sonni Danielsen lat lív í syndarligu flogvanlukkuni í Milano sunnudagin. Hann var til arbeiðis sum flogterna, tá flogførini stoyttu saman*

**27 ára gamli føroyingurin Eiler Sonni Danielsen var við í SAS flogfarinum, sum datt niður í Milano sunnudagin, og hann lat lív í vanlukkuni. Hann arbeiddi sum flogterna hjá SAS**

FLOGVANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Flogvanlukkan í Milano sunnudagin setti eisini síni spor í Føroyum. Mánadagin bórust tíðindi úr Italia, at ein føroyingur eisini var millum tey 118 fólkini, ið lótu lív í syndarligu flogvanlukkuni. Talan er um havnarmannin Eiler Sonna Danielsen.

Eiler Sonni Danielsen arbeiddi sum flogterna hjá SAS, og hann var til arbeiðis henda lagnutunga dagin.

Eiler Sonni búði við familjuni í Føroyum inntil einaferð fyrst í nítiárunum, tá hann saman við familjuni flutti til Danmarkar at búgva.

Foreldrini hjá Eiler eita Bjarni og Sofía Danielsen, og hann átti eisini ein systir, ið æt Beinta. Familjan býr í Strib á Fyn. Eiler búði í Keypmannahavn, men hann hevði júst keypt hús á Lollandi. Hann var ógiftur.

## Lærdi hjá Maersk

Eiler Sonni Danielsen lærdi sum flogterna hjá Maersk Air, men stutt eftir lokna lærutíð fór hann til SAS at arbeiða. Hann hevur verið starvsfólk hjá norðurlendska flogfelagnum í nøkur ár.

Eiler gekk á Handilsskúlanum í Havn, har hann fekk FHS-prógvið. Síðani fór hann á handilsskúla niðri í Danmark, har hann tók prógv á Hægri Handilsskúla.

Eiler Sonni Danielsen var eisini virkin tónleikari. Fyri einum lítlum ári síðani gav hann eina fløgu út við tíggju løgum. Tað var serliga country-tónleikur, sum hann fekst mest við. Fløgan nevnist "Sonni", og plátufelagið Tutl hevur staðið fyri søluni av hesi fløgu í Føroyum.

Hóast Eiler Sonni Danielsen var búsitandi í Danmark, so vitjaði hann mangan heima í Føroyum. Friður verið yvir minninum um Eiler Sonna Danielsen.

# Menniskjaligt mistak

**Tað var helst eitt menniskjaligt mistak, sum elvdi til vanlukkuna í Milano sunnudagin, tá SAS flogfarið stoytti saman við eitt lítið týskt Cessna flogfar, beint sum tað var farið á flog**

FLOGVANLUKKA
*Stefan í Skorini*



*Flogvanlukkan á Linate flogvøllinum í Milano sunnudagin kravdi 118 mannalív. Ein føroyingur var millum tey deyðu*

Bæði flogførini duttu niður, og øll fólkini umborð doyðu. Umborð á SAS flogfarinum vóru 110 fólk og í Cessna vóru fýra. Eftir samanstoytin kom eldur í SAS flogfarið, og tað datt niður í trimum pettum. Tað vildi so illa til, at flogfarið datt niður í ein bygning á flogvøllinum, har fýra fólk afturat lótu lív.

Tað er eftir øllum at døma flogskipanin í Cessna flogfarinum, sum hevur misskilt boðini úr eftirlitstorninum. Hann hevur so flogið fram ístaðinfyri at bíða, til SAS flogfarið var farið avstað.

Italska uttanríkismálaráðið avsannar allar leysasøgur um, at talan var um eina yvirgangsatsókn, tí eingi prógv eru, sum tala fyri hesum illgruna.

## Eingin radari

Eingin radari var á flogvøllinum, tá vanlukkan hendi. Tað ljóðar úr Italia, at radarin skuldi sýnast, og tí var hann tikin úr nýtslu tríggjar dagar fyri vanlukkuna.

Hesin radarin verður nýttur, tá sýnið er vánaligt, sum tað var henda dagin við tjúkkum mjørka. Væntandi ber ikki til at staðfesta veruligu orsøkina til vanlukkuna fyrr enn um eitt ár, tí tekniksu kanningarnar skuldu gerast sera neyvt, og tað tekur tíð.

SAS hevur gjørt av at lata teimum avvarðandi, ið mistu í vanlukkuni á Linate flogvøllinum í Milano, 25.000 dollarar ella 200.000 krónur. Hetta verður gjørt, uttan mun til hvørja niðurstøðu kanningarnevndin kemur fram til.

Fegin borgarstjóri:

# – Samstarvið byrjar beinanvegin

**Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, droymdi ikki um so stóra undirtøku fyri samanleggingini. Hann sigur, at kommunusamanleggingar eru ein náttúrlig gongd og í samsvari við ynski hjá løgmanni. Samstarvið byrjar beinanvegin, sigur borgarstjórin**

SAMANLEGGING
*Stefan í Skorini*

Rodmundur Nielsen sigur, at hann væntaði, at ein meiriluti fór at taka undir við samanleggingini, men at meirilutin fór at vera so greiður, tordi hann ikki at vóna.

Sáttmálin um samanlegging verður undirskrivaður í dag, mikudagin. Sáttmálin sigur, at kommunurnar verða lagdar saman 1. januar 2001, tá nýtt stýri tekur sæti. Ellivu limir verða í nýggja ráðnum.

Samstarvið er byrjað. Kommunurnar fáa innlit í viðurskifti hjá hvørjum øðrum, og soleiðis verður arbeiðið samskipað. Tekniska deild hjá Runavíkar kommunu hevur eitt nú loyst uppgávur fyri Skála kommunu, og soleiðis fer samstarvið at halda fram.

– Nú hava vit trý ár at fyrireika okkum, og samstundis kunnu vit prógva, at hetta var ein røtt avgerð, sigur Rodmundur Nielsen.

## Eitt fet í senn

Tá Rodmundur verður spurdur, um hann fer at fríggja til aðrar kommunur, so sigur hann, at mann skal taka eitt fet í senn. Tað heldur tó, at tað hevði verið ein fyrimunur, um kommunurnar um Skálafjørðin stóðu saman um at loysa fleiri uppgávur. Hann er eisini altíð tilreiðar at tosa um viðurskifti í sambandi við samanlegging.

Eivind Jacobsen, borgarstjóri á Strondum, hevur sett fram ynski um at leggja saman við Tórshavnar kommunu, men hesum tekur Rodmundur ikki undir við, tí andin í lógini um samanlegging sigur greitt, at talan skal vera um kommunur í sama øki.

Høvuðstankin aftanfyri samanleggingina hevur ikki verið at kappast við miðstaðarøkið, sigur Rodmundur Nielsen, sum vísir á, at tað verður neyðugt við samanleggingum, um kommunurnar skulu vera førar fyri at loysa tær uppgávur, sum verða lagdar út til tær at umsita.

**VALÚRSLIT Í RUNAVÍK**

Valluttøka 55,6% (951 av 1710)

| JA | NEI |
|---|---|
| 750 | 196 |
| 78,9% | 20,6% |

**VALÚRSLIT Á SKÁLA**

Valluttøka 79,5% (391 av 492)

| JA | NEI |
|---|---|
| 333 | 56 |
| 85,2% | 14,3% |



# Gloymd list



*Oddfríður Rasmussen, formaður í Lisa, sigur, at verður meira peningur ikki játtaður skapandi listini á fíggjarlógini, fara limirnir í Lisa at skipa fyri kravgongum og møguliga eisini boykotti av undirvísingini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Listafólkasamband Føroya er misnøgt við, at skapandi listin er við skerdan lut á fíggjarlógaruppskotin um fyri komandi ár. Verður uppskotið ikki broytt, fer Listafólkasambandið møguliga at skipa fyri kravgongum og boykotti**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Hóast fyrrverandi landsstýrismaðurin við undirvísingar- og mentamálum boðaði frá eini hækking á fíggjarlógini til skapandi list, er eingin slík hækking komin á uppskotið, sum nú liggur í tinginum. Verður peningur ikki játtaður skapandi listini, verða møguliga tiltøk sum kravgongur og boykott av undirvísingartilfari sett í verk.

Oddfríður Rasmussen, formaður í Listafólkasambandi Føroya, Lisa, sigur, at tað er ongum líkari enn, at undirvísing og list verða býtt hvørt sær á fíggjarlógini, hóast tey liggja undir sama stýri. Seinast fekk skapandi listin nøkur oyru á fíggjarlógini, og hesaferð er tað skúlin, sum fær alt. Løgið, heldur hann, at ikki kann hugsast um bæði í senn.

– Tað er ongum líkari enn, at nú ein lærari er vorðin landsstýrismaður, verður bara hugsað um skúlan, og skapandi listin verður gloymd burtur, sigur formaðurin í Listasambandinum.

Sum dømi um, hvussu ymiskt verður raðfest, vísir hann á, at tá ein lærari skal til eftirútbúgving, fær hann - sum eisini rætt og rímiligt er - alt goldið. Skal myndlistafólk hin vegin hava eina eftirútbúgvin, sum fáast má uttanlands, er møguligt at fáa 7.000,- krónur játtaðar. Av hesum fer helvtin í skatti, meðan restin illa nokk er fyri ferðaseðil til Danmarkar. So ójavnt er býtt, vísir formaðurin í Listasambandinum á.

Oddfríður Rasmusen leggur dent á, at Lisa hevur avgjørt einki í móti, at skúlin fær teir pengar, honum tørvar. Tvørtur ímóti. Men hann vísir á, at tað kann tykjast løgið, at skapandi listin púra verður við sviðisoð, tá nú fyrrverandi landstýrismaðurin hevði boðað frá eini hækking á fíggjarlógini.

Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður við mentamálum, boðaði frá eini hækking upp á eina hálva millión til skapandi listina á komandi fíggjarlóg. Nú uppskotið er komið, er tann játtanin ikki við, meðan skúlin hevur fingið einar 12 milliónir afturat tí, hann hevði seinast, hóast hann ikki hevur fingið í námind av tí, brúk er fyri.

## Steðga undirvísingartilfari

Listafólkasambandið ætlar sær ikki bara at sita og hggja at, meðan tey lyfti, sambandið hevur fingið, renna út í sandin. Verður einki burtur úr, fer Lisa at skipa fyri tiltøkum, sum fara at merkjast, sigur Oddfríður Rasmussen, formaður í Lisa.

Hann vísir á, at rithøvundafelagið er limur í Lisa. Og rithøvundar eiga rættindini til lesitilfar, sum brúkt verður í skúlanum. Tí ber til hjá teimum at seta forboð fyri, at tilfar teirra verður brúkt til undirvísing og próvtilfar í skúlanum. Og tað fer at merkjast, sigur formaðurin í Lisa, sum sjálvur er rithøvundur.

Tað eru 2.000 limir í Listasambandinum, sigur Oddfríður Rasmussen, og seta teir allir tiltøk í verk samstundis, fer tað at merkjast.

Hann sigur, at Lisa fer at fylgja við, hvussu leikur fer í løgtinginum, nú fíggjarlógin er fyri. Tey fara stutt og greitt at seta seg niðan í tingið og síðan at síggja, hvat gjørt verður.

## Stórur tørvur

Skulu umstøðurnar hjá skapandi listafólki í Føroyum samanberast við tær hjá listafólki í hinum Norðurlondunum, skulu játtast einar 60 milliónir krónur á fíggjarlógini, sigur Oddfríður Rasmussen. Men tey fáa onga, soleiðis sum fíggjarlógaruppskotið er háttað, nú tað fer til fyrstu viðgerð.

Hann vísir á, at tað er sera trupult hjá skapandi listafólki at gera nakað, tí øll hava fyri neyðini at hava fulltíðarstarv, og so listina við síðuna av. Tað átti at verið øvugt, um neyðugt yvirhøvur skuldi verið at havt lønandi starv umframt listina, sigur hann.

Starvslønirnar hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum hava gjørt øgiligan mun hjá tiemum, sum fingið tær hava, ásannar formaðurin í Lisa. Men tær eru bara so vælsignað smáar, at tað munar lítið í stóra samanhanginum.

Tá starvslønirnar komu, varð hildið, at nú stóð væl til tí nú kundu fólk arbeiða við lisitni burturav.

– Jú, onkur hendingur kann, sigur Oddfríður Rasmussen. Men veruleikin er kortini tann, at talan er um pengar, sum tiknir eru av aðrari konto hjá stýrinum, sum so listafólkini aftur fáa minni av.

Tað var ein konto, sum ætlað var til ávísar verkætlanir. Hon var upp á tríggjar milliónir krónur, men er nú skorin í helvt, soleiðis at hálvonnur millión fer til starvslønir. So tað sær ein og hvør, at har er lítil bati, sigur Oddfríður Rasmussen. Heldur tvørturímóti.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerkingar frá Óla Holm, landsstýrismanni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Dragshow í Platform

DRAGSHOW
*Ingrid Bjarnastein*

Enn eitt stórt tiltak verður í Platform í vikuskiftinum. Eydnast hevur at stápla Føroya fyrsta dragshow uppá beinini.

Teir báðir, Nikolaj Møller og Richard Nielsen, frá sendingini "Baren", ið TV3 sendi síðsta vetur, ferðast í løtuni runt í Danmark við einum "comedy dragshow", sum ongantíð áður er sætt av mannaeygum.

Rátt og gott undirhald verður á skránni. Meiningin er, at áskoðararnir skulu fáa reyð oyru og ilt í búkin av grin.

Sagt verður, at hetta er showið, sum tú MÁST síggja. Ímynda tær Nikolaj og Richard í eini playbunny svimjidrakt ella í reingerðingarkittli. Hetta verður kallað tað stóra Lokumshowið!

Aftaná framførsluna verður møguleiki at møta teimum báðum í barrini, har teir vera gestabarrvørðar. Teir verða eisini at hitta í barrini í Platform leygarkvøldið.



*Nikolaj Møller og Richard Nielsen frá "Baren" hava Føroya fyrsta dragshow í Platform í vikuskiftinum.*